# ítróttur

Nr. 129 • fríggjadagur • 9. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# FCK treivst betur á grasinum

**Við einum tryggum 4-1 sigri á føroyameistarunum úr HB fekk FCK mikukvøldið víst, at talan var um ein svipsara í Klaksvík mánakvøldið**

HB-FCK
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Brasiliumaðurin Alvaro Santos skoraði tvær ferðir fyri FCK ímóti HB, meðan Heðin á Lakjuni var nær við, tá ið hann hevði eitt frálíkt langskot, sum Rabocki í málinum hjá FCK bjargaði meistarliga.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað hóskaði danmarksmeistarunum betur at leika á grasi, og tað sást eisini aftur á spælinum hjá FC Keypmannahavn, at teir mikukvøldið kendu seg í meiri "heimligum" umhvørvi, tá ið teir dystaðust við HB á Tórsvølli.

**Javnur hálvleikur**

Eins og í dystinum í Klaksvík mánakvøldið var Todi Jónsson við frá byrjan, og hann var eisini liðskipari hjá donsku greipuvinnarunum. Hesaferð var álopsfelagin hjá Toda stóra stjørnuskotið í donskum fótbólti í farna kappingarári, Jesper Bech, men um miðjan fyrra hálvleik kom Alvaro Santos inn fyri ein meiddan Martin Bergvold, og tá fór Jesper Bech aftur á miðvøllin at spæla.

Fyrri hálvleikur var rættuliga javnur. Bæði liðini royndu at spæla skjótt fram eftir vøllinum, men tað gekk eitt sindur striltið at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Hjá HB tóktist trupulleikin serliga at verða, at tá ið man við ferð kom fram eftir vøllinum, høvdu føroyameistararnir lyndi til at líka at steðga á, og tað tók ofta brodd av einum vandamiklum kontraálopi. HB høvdi mikukvøldið enn einaferð unga Emil Nolsøe Leifsson á sentrala miðvøllinum, og hann er ein ógvuliga spennandi leikari, ið óivað fer at gerast ein berandi kraft í reyðu og svørtu strípunum í framtíðini.

FC Keypmannahavn vísti mikukvøldið væl betur fótbólt, enn hvat teir gjørdu í Klaksvík tveir dagar frammanundan. Hesaferð vóru teir báðir, Thomas Røll og Christian Traore, á sentrala miðvøllinum, meðan teir báðir Martin Bergvold og Morten Bertolt vóru úti í síðunum. Hendan uppstillingin vísti seg eisini at verða væl meiri skapandi enn útgangsstøðan mánakvøldið, og møguleikarnir vóru av tí sama fleiri í tali.

Tá ið ein hálvur tími var leiktur av fyrra hálvleiki, var Thomas Røll nær við at leggja FCK á odda, men Danny Rasmussen í HB-málinum helt góða skotinum frá miðvallaranum. Løtu seinni var nær við í hinum endanum, tá ið Heðin á Lakjuni royndi seg við einum frálíkum langskoti, sum høvdi kós beint upp í málhornið, men Balasz Rabocki í FCK-málinum fekk meistarliga boksað bóltin út til hornaspark.

Minuttin eftir var aftur vandi á ferð framman fyri málinum hjá HB, tá ið Morten Bertolt gjørdist púra leysur. Danny Rasmussen kom út ímóti honum og bjargaði hegnisliga.

Seinastu løtuna av fyrra hálvleiki høvdi HB fleiri naskar royndir á FCK-málið, men ístaðin vóru tað donsku greipuvinnararnir, ið løgdu seg á odda beint fyri steðgin. Todi Jónsson slapp leysur í HB-brotsteiginum, men bleiv rendur um koll, og dómarin, Lassin Isaksen, ivaðist ikki og dømdi brotsspark til býarfelagan hjá sær. HB-leikararnir vóru ikki nøgdir við dómin, men av áskoðaraplássunum sá avgerðin út til at verða tann rætta. Innskifti brasiliumaðurin, Alvaro Santos, fíntaði Danny til aðra síðuna og sendi bóltin í hina, og so hevði FCK fingið sítt fyrsta mál á Føroyaferðini.

**Orkan gekk undan**

Teir okkurt um 1750 áskoðararnir, ið høvdu goldið fyri at síggja dystin, sóu eitt heilt nýtt FCK-lið eftir steðgin. Saman við teimum áleið 200 áskoðarunum, sum ikki vildu gjalda, og tískil høvdu plaserað seg eitt nú við ítróttarhøllina og uppi við svimjihylin, sóu hesi, at Alvaro Santos knappar tveir minuttir inn í seinna hálvleik økti um leiðsluna hjá FCK. Santos bleiv spældur ígjøgnum mitt á, og hvørgin av HB-miðverjunum fekk takláð. Tað var tí lætt hjá brasiliumanninum at senda framvið innskifti Pól Næss Joensen í HB-málinum, og so var 2-0.

HB skal tó eiga, at teir góvu ikki skarvin yvir, og góðar fimm minuttir seinni bragdaði endiliga hjá føroyameistarunum. Havnarmenninir vunnu bóltin í egnari verju, og Jákup á Borg bleiv sendur avstað í høgra borði. Hann snýtti vinstra bakk hjá FCK, estiska Urmas Rooba, áðrenn hann sendi innfyri. Rógvi Jacobsen, rann ímóti fremru stong og dróg miðverjarnar hjá FCK við sær, meðan HB-liðskiparin, Rúni Nolsøe, kom stormandi av miðvøllinum. Rúni rann ímóti handaru stong, og tað var júst har, at inleggið hjá Jákupi lá, og liðskiparin smekkaði í kassan, og so var 1-2. Eitt sera gott mál og avgjørt besta málið í dystinum.

Føroyameistararnir fingu nú blóð uppá tonna, men samstundis byrjaði orkan at ganga undan hjá nógvum av føroysku leikarunum, og tí blivu eftiransingarnar ikki nóg neyvar. Gestirnir løgdu seg á odda 3-1, tá ið 63 minuttir vóru leiktir. Alvaro Santos slapp meira ella minni ótarnaður at renna oman ímóti baklinjuni, áðrenn hann legði skrátt út frá til Michael Silberbauer, ið hevði pláss og tíð til at plasera bóltin framvið Pól í HB-málinum. Bert fýra minuttir seinni var aftur galið í HB-verjuni, og enn einaferð var tað Michael Silberbauer, ið var upp á spæl. Kantspælarin í høgru síðu slapp at trekkja inn mitt á, og tá ið ongin leyp á, valdi Silberbauer at skjóta áraka brotsteigarmarkið, og bólturin smeyg sær inn við handaru stong. Eitt alt ov bíligt mál, ið eigur at geva HB-verjuni og venjaranum okkurt at hugsa um.

Seinastu løtuna av dystinum hevði FCK fleiri aðrar møguleikar, men antin vóru teir ikki nóg neyvir, ella var Pól Næss Joensen á rætta staðnum og fekk vart fyri. Einu løtuna bleiv eitt sindur rokaligt, tá ið Peter Møller sendi Vagnur Mohr Mortensen í vøllin, hóast ongin bóltur var í nánd. Lassin Isaksen fekk sissað leikararnar, og hann vísti gestablídni við at vísa bæði Møller og Vagnur gula kortið. Ein avgerð sum ikki fall í góða jørð hjá áskoðarafjøldini og heldur ikki hjá stadionspeakaranum, sum tó seinni kunngjørdi, at tað framvegis vóru 22 mans á vøllinum.

### FAKTA

**HB-FC Keypmannahavn 1-4(0-1)**
0-1 Alvaro Santos brtsp.
0-2 Alvaro Santos
1-2 Rúni Nolsøe
1-3 Michael Silberbauer
1-4 Michael Silberbauer
**HB:** Danny Rasmussen - Hallur Danielsen, Vagnur Mohr Mortensen, Símun Eliasen, Janus Joensen - Kári Nielsen, Emil Nolsøe Leifsson, Rúni Nolsøe - Jákup á Borg, Rógvi Jacobsen, Heðin á Lakjuni.
Skiftir inn í dystinum: Eli Thorsteinsson, Pól Næss Joensen, Rasmus Nolsøe, Rókur Jespersen, Páll M. Joensen og Hendrik Rubeksen
**FCK:** Balasz Rabocki - Peter Christiansen, Bo Svensson, Bora Zivkovic, Janne Saarinen - Morten Bertolt, Christian Traore, Thomas Røll, Martin Bergvold - Jesper Bech, Todi Jónsson.
**Skiftir inn í dystinum:** Benny Gall, Lars Jacobsen, Ole Tobiasen, Dan Thomassen, Urmas Rooba, Michael Silberbauer, Hjalte Bo Nørregaard, William Kvist, Peter Møller og Alvaro Santos.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**Áskoðarar:** uml. 2000



# Hugburðurin á muni

**Todi Jónsson helt eftir dystin mikukvøldið á Tórsvølli, at sigurin á HB vísti veruliga munin á føroyskum og donskum fótbólti**

FÓTBÓLTSPRÁT
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*




*Eftir dystin helt Todi Jónsson, at hugburðurin hjá liðfeløgum hansara var nógv betur í dystinum mikukvøldið enn í dystinum í Klaksvík mánakvøldið.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mikukvøldið leikti Todi, eins og mánakvøldið í Klaksvík, allan fyrra hálvleik, og hóast hann ikki kom á máltalvuna, so fekk hann tiltuskað FCK eitt brotsspark beint fyri hálvleik, soleiðis at FC Keypmannahavn legði seg á odda í dystinum.

**Betur hugburður í dag**

Spurdur um munin á dystinum mikukvøldið ímóti HB og so dystinum í Klaksvík mánakvøldið, sigur Todi Jónsson, at til dystin í Havn sýndu FCK-leikararnir nógv betur hugburð, og tað gjørdi munin. - Eg haldi, at nógvir av spælarunum hjá okkum tóku uppgávuna í so lætt í Klaksvík, og tað sást eisini aftur á úrslitinum. Tískil vóru vit meiri motiveraðir til dystin í dag, sigur Todi Jónsson. Hann heldur eisini, at talan var um eitt antiklimaks, tá ið teir leiktu í Klaksvík, tí tað var nógvur vindur og kalt, og teir eru heldur ikki vanir við at leika á graslíki.

– Hetta er tó ikki nøkur umbering, tí vit eiga at kunna levera vøruna, sigur Todi Jónsson. – Í dag fingu vit tó víst tann veruliga munin, ið er á donskum og føroyskum fótbólti, heldur Todi og leggur afturat, at var FC Keypmannahavn í toppformi, so var munurin kanska enn størri, uttan tó at taka nakað frá HB. Todi Jónsson fegnast tó um, at bæði KÍ og HB í dystunum ímóti FCK hava víst positivan fótbólt heldur enn at standa afturi í verjuni og lossa bóltarnar fram, soleiðis sum føroysk lið høvdu lyndi til at gera fyrr, sigur hann.

**Glaðir fyri vitjanina**

Spurdur hvat hann og liðfelagar hansara hava fingið burtur úr Føroya-vitjanina, sigur Todi Jónsson skemtandi, at teir hava fingið staðfest, at tað er kalt í Føroyum. Todi sigur, at liðfelagar hansara hava verið glaðir fyri vitjanina í Føroyum, og millum annað vóru teir seg fegnir um fiskitúrin við Norðlýsinum, sum teir vóru týsdagin.

Nú eru niðurteljingin til donsku kappingina av álvara farin í gongd, og Todi Jónsson sigur, at á Føroyaferðini hava leikararnir eisini vant hart, og allir vilja gera sítt besta, so at teir eru við á liðnum, tá ið heimliga kappingin í Danmark fer í gongd. Todi Jónsson hevur verið nógv darvaður av skaða seinnu árini, og framvegis er hann eitt sindur eymur í baklærinum, nú farið verður undir eitt nýtt kappingarár. - Høvdu vit ikki leikt ímóti føroyskum feløgum, hevði eg neyvan verið við á liðnum við síðstu dagarnar, sigur Todi Jónsson. Hann vónar tó, at hann er í toppform, tá ið landsdysturin ímóti Malta er á skránni í komandi mánaða.

**Venjararyrki lokkar**

Nú Todi Jónsson er blivin 32 ár, er klaksvíkingurin greiður yvir, at hann ikki hevur nógv ár eftir í toppfótbólti. Todi hevur eitt ár eftir av sáttmála sínum við FC Keypmannahavn, og enn hevur hann ikki gjørt av, hvussu verður, tá ið hetta kappingarárið er farið aftur um bak. – Um eg ikki fái so nógva spælitíð í ár, so er tað stórur møguleiki fyri, at eg fari at finna mær eitt annað felag komandi summar, um eg altso eri nøkunlunda skaðafríur, sigur Todi Jónsson. Spurdur um hann nakrantíð aftur verður at síggja í føroyskum fótbólti, sigur Todi Jónsson, at tað er ilt at meta um. – Eg havi umhugsað at royna venjarayrki, og í tí sambandi er eitt slíkt starv sum tað hjá Heina Fernandez, ið er leikandi venjari í HB, eitt ideelt starv, sigur Todi Jónsson at enda.

# Vónbrotnir av býráðnum

**Eftir dystin ímóti donsku meistarunum klæddu leikararnir hjá HB seg í fínasta stás, tí teir skuldu til døgurða saman við donsku gestunum, hildu teir. Tað vísti seg tó, at Tórshavnar Býráð bert hevði bjóðað donsku leikarunum til døgurða, og tað vóru HB-leikararnir ógvuliga vónbrotnir av**

VÓNBROTNIR LEIKARAR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Meðan leikararnir á danska meistaraliðnum FC Keypmannahavn sótu til borðs og fingu sær ein betri bita á Hotel Føroyum, sum Tórshavnar Býráð bjóðaði, sótu leikararnir á føroyska meistaraliðnum HB á eitt pitsamatstovu og ótu pitsa fyri egna rokning.

**Munur á býráðum**

Sum skilst høvdu leikararnir hjá HB gjørt seg klárar til at fara til døgurða á Hotel Føroyum saman við Toda Jónsson og liðfeløgum hansara aftaná dystin millum HB og FCK. Føroysku leikararnir klæddu seg í fínasta stás, men fingu knappliga at vita, at Tórshavnar Býráð bert hevði bjóðað donsku leikarunum til døgurða umfram tveimum umboðum fyri nevndina í HB og tveimum fyri Tórsvøll. Tískil noyddust HB-leikararnir at fara og fáa sær ein bita fyri egna rokning.

Leikararnir hjá havnarfelagnum vóru ógvuliga vónbrotnir av, at Tórshavnar Býráð sýndi teimum so lítla virðing, at teir ikki vóru bodnir við til døgurðan. Ein av spælarunum hjá HB sigur við Sosialin, at tað er munur á Tórshavnar Býráð og Klaksvíkar Býráð. Tá ið FCK vitjaði í Klaksvík mánadagin, bjóðaði býráðið har norðuri øllum FCK hópinum, KÍ-leikarunum við makum og øðrum til døgurða, meðan býráðið í Havn bert bjóðar vitjandi liðnum til døgurða, sigur hann.

# Frálíkur Føroyatúrur

**Ítróttarstjórin í FC Keypmannahavn, Niels Christian Holmstrøm, er sera væl nøgdur við vitjanina hjá donsku meistarunum í Føroyum**

FØROYAVITJAN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Donsku gestirnir úr FC Keypmannahavn er stak glaðir fyri dagarnar, ið vitjað hevur verið í Føroyum. Niels Christian Holmstrøm sigur, at teir hava havt nakrar frálíkar dagar við nógvari venjing. Somuleiðis heldur ítróttarstjórin í FCK, at teir hava leikt tveir góðar venjingardystir, ið hava givið góða dystarvenjing. Eisini hevur túrurin í Føroyum verið øgiliga góður fyri samanhald í hópinum, heldur hann.

**Framúr stríðsvilji**

Niels Christian Holmstrøm sigur, at hann er ikki bilsin av støðinum, ið føroysk feløgini leika á. Hann heldur, at bæði KÍ og HB eiga alla rós fyri tveir góðar dystir, har bæði liðini sýndu góðan fótbólt og framúr stríðsvilja, sigur hann.

Um dystin mikukvøldið sigur Niels Christian Holmstrøm, at tað var ein fyrimunur fyri FC Keypmannahavn at leikt var á grasi, tí at tað eru teir jú vanir við, meðan HB hinvegin ikki eru so vanir við grasvøll.